**DAG BLAÐIÐ**

**Avdúking í Oyggjatíðindum: »Dan umhugsar at stevna«. Stórtíðindi eru væl ikki, at Dan hevur fingið nakað at hugsa *um*, men at har er nakað at hugsa *við*.**

*

**Ella:**
**Hugsar Dan *um* at stevna, so hevur hann fingið nakað at hugsa *við*. Tað má væl vera avdúkingin (!) í Oyggjatíðindum fríggjadagin.**

*

**Lasse fingið flotvit?!**

*

**Ímillum ferðafólk úr Føroyum verður nógv tosað um »Purkhússeðilin« — hann er grønur og kostar 200 krónur.**

*

**Dan minnir meg á svínoyingin á sinni, sum »ikki livdi heilt væl, um hann ikki hevði minst tvær sakir gangandi í senn.«**

*

**Janos Kader, kommunistiski giktarrunnurin, sum stjórnar Ungarn, er komin so langt við liberaliseringini av búskapinum, at hann hevur yvirhálað Arabo í einum høgrasvingi!**

*

**Claus Barbie fekk lívstíð fyri at senda 40 jødisk børn til nazistisk týningartippi.**
**Michael Gorbatjov fær heitið »friðar«eingilin mikli fyri at senda 40.000 afghanskum bøtnum leikutoysbumbur.**

*

**Partafelags-skrásetingin hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**
Skrásetingar-nr. 51/1983, **P/f Fríu Føroyar, Tórshavn:** Johannes Ragnar Magnussen, Argir, Tórður Jóansson, Argir og Arnbjørn Randrup Thomsen, Tórshavn, eru farnir úr nevndini. Nevnd felagsins er nú hendan: Formaður, Ejvind **Vøgg** Guttesen, Tórgarðstrøð 7, Tórshavn, Árni Dahl, Bóndabrekka 11, Tórshavn, Marianna Debes Dahl, Bóndabrekka 11, Tórshavn. Teknaði partapeningurin er hækkaður við kr. 30.000,00 til kr. 50.000,00. Av nýteknaða partapeninginum er goldið kr. 8.000,00.

Føroya Landfúti,
Tórshavn, 30. juni 1987
**M. Nepper-Christensen**

**GLASNOST?**

*Rós til pf. Fiskahúsið:*

# Drepa laksalús við feskvatni og snultarar við saltvatni!

**Við eini aliskipan, har møguleikar eru fyri at nýta bæði feskt og saltvatn, slepst undan at nýta vandamikil kemisk evni til tær ringastu plágurnar. Leiðarar á »Forsøgsdambruget« í Brøns, sum eru vitandi alingina hjá pf. Fiskahúsinum í Kollafirði, siga, at spurningurin er so einfaldur, at fær henda aliskipanin t.d. laksalús, so verða lýsnar dripnar við stigvísari tilvenjing til fekstvatn, og koma snultarar frá feskvatni í skipanina, so ber til at drepa teir við stigvísari tilvenjing til saltvatn.**

»Forsøgsdambruget« metir tað sera skilagott at leggja alistøðir har, sum møguleiki er fyri at fáa ríkiligt av feskum vatni, men samstundis so nær sjógvi, at tað fíggjarliga er yvirkomiligt at pumpa sjógv inn í skipanina.

»Forsøgsdambruget« hevur sett nakrar neyvar reglur upp, hvussu ein tílík aliskipan kann skipast á besta hátt, og skemtiligt er at síggja, at tey ávara móti verkfrøðingum í tann mun, at tey siga, at »stol aldrig på ingeniørmæssige beregninger, idet ingeniører glemmer biologien«. M.a. tí meta tey, at øll rør, kanalir og kranar skulu altíð vera størri enn verkfrøðingarnir meta.

**LÚS OG SNULTARAR**

Ein tann størsti trupulleikin við aling — eisini í Føroyum — er lýs og aðrir snultarar. Á hvørjum ári verða nýttar stórar upphæddir í bardaganum móti lýsnum, men tær venda altíð aftur. Kemisk evni verða nýtt í hesum bardaga, sum hóast tey eitast vandaleys, avgjørt ikki eru gagnlig fyri fiskin.

Men tað ber til at drepa bæði lýs og snultarar uttan yvirhøvur at nýta kemisk evni. Nevniliga bert við at skifta millum feskt- og saltvatn.

»Forsøgsdambruget« vísir á, »når man kan veksle mellem fersk- og saltvand, så kan man også blande. Får i lakselus, kurerer i med ferskvand, og få i hudsnyltere fra ferskvand, kurerer i med saltvand. Ved overgang fra fersk til saltvand og omvendt kan i ved blanding sørge for langsom tilvænning«. So einføld er uppskriftin, og alingin í pf. Fiskahúsinum í Kollafirði er besta prógvið um, at hetta er møguligt, tí har er ongantíð brúkt eitt gramm av kemiskum evnum í sambandi við alingina. **ójr**

# Hvítanes farin til fiskiskap

**Hvítanes, nýggjasta rækjuskipið í flotanum, skuldi fara til fiskiskap í gjár. Vit frætta annars, at fiskiskapurin hevur verið smáligur síðstu tíðina.**



*Hvítanes tá skipið fyrstu ferð kom inn um molan í Havn*

Síðan Hvítanes varð latin eigarunum hevur skipið ligið inni á Skála og rigga til fyrsta túrin. Tá vit frætta leygardagin skuldu teir fara úr Føroyum í gjár.

25 menn verða við skipinum fyrsta túrin, og skipari verður Daniel Pauli Danielsen, sum eisini er reiðari.

Leiðin gongur til Svalbards. Síðstu tíðina hevur fiskiskapurin hjá føroysku skipunum har verið heldur slakur.

**SLAKUR FISKISKAPUR**

Ove Berg, reiðari á Artic Prawns sigur, at skipið nú hevur 300 tons inni, men síðstu dagarnar hava teir fingið niðan fyri eitt tons í hálið.

Artic Prawns fór úr Føroyum 16. apríl. Hetta er fyrsti túrur hjá skipinum, og fyrstu dagarnar høvdu teir ymsar byrjunnartrupulleikar at dragast við. Tí byrjaðu teir ikki fiskiskap fyrr enn 1. mei. Síðani hava onkur smávegis brek verið, men gjøgnumgangandi hevur nýggja útgerðin rigga hampuliga væl.

Annars er hetta ringasta tíð til rækjur, so væntandi er, at betur fer at vignast tá tað líður longur út ímóti heysti. **andor**